# SPANIA HEIM

# Viva España!




**HM2010** Nógvir spiltir málmøguleikar og spæl í tveir tímar máttu til, áðrenn lágvaksni Barcelona-miðvallarin, Andrés Iniesta, gjørdist tann størsti av øllum og sendi Spania til himmals

Hilmar Jan Hansen

Tað var ikki fyrr enn í 116. minutti, at Iniesta skoraði avgerandi málið, og við 1-0 sigrinum fekk Spania vunnið sítt fyrsta heimsmeistaraheiti nakrantíð.

– Hetta er heilt ótrúligt og ein heilt serlig gleði, tá tú skilir, at tú hevur vunnið. Orð kunnu slett ikki lýsa mínar kenslur, og beint eftir málið hugsaði eg bara um familju mína og tey, eg eri góður við. Sigurin er úrslit av hørðum arbeiði, segði Iniesta.

Samstundis sum hann og liðfelagarnir kundu fegnast um, at tað umsíður eydnaðist at koma heilt upp á tindin, endaði tað fyri Holland upp á sama máta sum í 1974 og 1978, og appelsinlitta tulipanlandið eigur enn á at vinna eina HM-finalu.

Gjøgnum alla kappingina hevur Spania spælt væl og staðið fyri vøkrum fótbólti, men uttan at fáa tey nógvu málini. Nú teir sjey dystirnir í HM-endaspælinum eru av, hava spaniólar bara skorað átta mál, sum er søguliga lítið, og allir sigrarnir hjá Spania vóru 1-0 sigrar.

Men hóast tað ikki blivu tey nógvu málini, ið eyðkendu finaluna millum Spania og Holland, so treyt spenningurin ikki. Báðir partar høvdu risastórar møguleikar í dystinum, og Spania kundi saktans havt avgjørt dystin fyrr í umdystinum, men brendi fleiri stórar kjansir.

### Løgdu nógv fyri

Tað skiltist á øllum brøgdum, at dysturin hevði stóran týdning, tí innan fyri minni enn eitt korter í fyrra hálvleiki av vanligu leiktíðini gav dómarin fimm gul kort. Og tað var lagið gjøgnum allan dystin, so tað til síðst bara var ein spurningur, hvør fór at síggja reytt. Tað gjørdist so hollendski John Heitinga í 110. minutti.

Holland hevði týðiliga lisið væl uppá og sett sær fyri, at ikki skuldu gerast somu mistøk, sum Týskland gjørdi í síni hálvfinalu ímóti Spania, tá týskarar ikki komu inn í dystin, fyrr enn hann mestsum var avgjørdur. Tað var heldur ikki, fyrr enn hollendingarnir bara vóru 10 mans eftir á vøllinum, at Spania veruliga fekk brúkt vøllin og megnaði at skora.

Í veruleikanum vóru bæði Mark van Bommel og Nigel de Jong hepnir, at teir sluppu at spæla allan dystin á tamb, tí teir gingu so høgt upp í uppgávuna, at tað í løtum var mestsum ov mikið av tí góða. Serliga hevði Nigel de Jong hepni við sær, tá hann stemplaði Xabo Alonso í bringuna, uttan at tað kostaði honum meira enn eitt gult kort.

Spania legði annars betur fyri í Soccer City í Johannesburg, og hóast tað lá illa fyri at fáa miðvøllin spældan, tí hollendingar lógu tættir í monnunum, trillaðu spaiólar bóltin millum sín og royndu at skapa álop og møguleikar. Hinvegin gjørdi Holland í so nógv av at senda bóltar langt fram eftir vøllinum.

### Spiltir málkjansir

Fyrsti stóri málmøguleikin kom longu, tá bara fimm minuttir vóru farnir. Xavi Hernandez slapp leysur av uppdekkingini og fekk spælt bóltin til Sergio Ramos, ið skallaði hart ímóti málinum. Men bert ein klassabjarging frá Maarten Stekelenburg forðaði fyri, at hol kom á longu tá.

Síðsta hálva tíman av vanligu tíðini skuldu bæði lið havt fingið okkurt mál. Wesley Sneijder spældi

## Málið vert 177 milliónir

**HM2010** Tá Iniesta setti bóltin í málið og avgjørdi HM-finaluna, setti hann samstundis 177 milliónir krónur inn á bók hjá spanska fótbóltssambandinum

Hilmar Jan Hansen

Eitt heimsmeistaraheiti er ikki bara tað gylta steypið, ið vælsaktans er størsti heiður, vinnast kann í fótbólti kring knøttin.

Sum so nógv annað her í verðini, hevði málið hjá Andrés Iniesta eisini eitt ávíst virði í krónum og oyrum, tí heimsmeistaraheitið merkir, at spanska fótbóltssambandið fær 177 milliónir krónur frá altjóða fótbóltssambandinum, FIFA.

Og hóast hollendingar nú munnu sleikja síni sár, standa teir heldur ikki eftir við ongum, tí tapta finalan merkir, at Holland fær 142 milliónir krónur fyri at hava spælt seg í finaluna.

Týskland og Uruguay, ið taptu hálvfinalurnar og gjørdust ov stutt hesa ferð, fáa 118 milliónir krónur í part, eins og tapararnir í fjórðingsfinalunum – Argentina, Brasil, Ghana och Paraguay – fáa 106 milliónir.

Liðini, sum ruku út í áttandapartsfinalunum, fáa 53 milliónir í part, og tey, ið ikki megnaðu at spæla seg víðari úr bólkaspælinum, sita hóast alt eftir við 47 milliónum krónum, sum eisini í hasi verðini munnu vera eitt sindur av einum plástri á sárið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*